# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Vit elska hetta landið , og vit vilja ikki lata tað halda fram sum seinastu átta árini*

*Barrack Obama*

# 85.000 fagnaðu Barrack Obama



*Leikvøllurin í Denver var fullsettur, tá Obama helt røðu*

*Mynd: AP*

**Røðan, sum demokratiska forsetavalevnið helt í morgun, var tann mest ágangandi og samstundis tann sakligasta, sum hann hevur hildið**

Leikvøllurin í Denver var fullsettur tíðliga í morgun, og fleiri túsund fólk noyddust at bíða uttanfyri, tí øll vildu sleppa at síggja og hoyra Barrack Obama halda sína fyrstu røðu, eftir at hann gjáranáttina var varðin forsetavalevni hjá demokratiska flokkinum. Eftir at Sheryl Crowe, John Legend, Stevie Wonder og Al Gore høvdu havt mikrofonina, kom Obama endiliga á pallin.

-Tað er við stórum takksemi, at eg góðtaki avgerð tykkara at velja meg til forsetavalevni, segði Obama, og hóast øll vistu, at hann skuldi byrja við hesum orðunum, mundi fagnaðurin ongan enda fingið.

Mong høvdu við stórum spenningini bíðað eftir røðuni. Eitt var, at hon bleiv hildin júst 45 ár eftir ta kendu „I have a dream"-røðuna hjá Martin Luther King Jr., og so var røðarin tann fyrsti afro-amerikanarin, sum er valdur til forsetavalevni. Aftaná vóru flestu eygleiðararnir á einum máli um, at røðan var ein tann mest sakliga, sum Obama hevur gildið, men samstundis eisini tann mest ágangandi. Sum væntað var tað kappingarneytin, sum stóð fyri skotum.

-John McCain er góður við tað amerikanska fólkið, men hann skilir ikki tann vanliga amerikanaran og hansara gerandisdag, segði Barrack Obama og endurtók, at velja amerikanararnir McCain, fáa teir fýra ár við sama politikki, sum verandi leiðslan hevur rikið tey seinastu átta árini.

Slagorðið Obama er broyting, og í røðuni komu nøkur boð uppá, hvørja broyting hann ætlar at fremja, verður hann valdur í heyst. Millum annað skulu stórfyritøkurnar ikki hava størri skattalætta, tær smáu fyritøkurnar skulu ikki rinda kapitalskatt, 95 prosent av øllum arbeiðarahúskjunum skulu hava skattalætta, og skúlaverkið skal fáa fleiri lærarar, sum skulu hava hóskandi løn. Um orkupolitikkin segði hann, at málið er at loysa USA frá oljutørvi úr Miðeystri um tíggju ár, og í sama tíðarskeiði skal USA brúka 150 milliardir dollarar til varandi orkukeldur.

Teir seinastu mánaðirnar hava McCain og onnur fýlst á, at Barrack Obama hevur ongar uttanríkispolitiskar royndir, og at hann tí ikki er førur fyri at taka týðandi avgerðir, sum kunnu umfata amerikanska hermegi uttanlands. Tann spurningin tók Obama upp í morgun.

- Sum ovasti fyri hermegini fari eg ikki at drála tað minsta, tá tað snýr seg um at verja land okkara, men eg fari ikki at senda hermenn av landinum uttan eina greiða uppgávu og uttan ta neyðugu útgerðina, eins og teir skulu fáa ta røttu móttøkuna, tá teir koma aftur, segði hann.

# USA legði kreppuna í Georgia til rættis



*Vladimir Putin er russiskur forsætisráðharri*

*Mynd: Polfoto*

**Russiski forsætisráðharrin, Vladimir Putin, heldur, at kreppan í Georgia skuldi hjálpa John McCain at vinna forsetavalið í heyst**

Amerikanska leiðslan gav georgisku stjórnini boð um at seta eina hernaðarliga kreppu í verk, tí sambært Washington kundi ein kreppa við Russland koma republikanska forsetavalevninum, John McCain, til góðar. Tað heldur í hvussu er russiski forsætisráðharrin.

-Amerikanskir ríkisborgarar vóru í økinum, tá kreppan tók seg upp. Teir høvdu fingið boð, sum teir eisini settu í verk, og hesi boð vóru av slíkum slagi, at tað eru bara amerikonsku leiðararnir, sum kunnu geva tey, segði Vladimir Putin í samrøðu við CNN í gjárkvøldið. Hann legði afturat, at tað eru alt fleiri ábendingar um, at kreppan í Georgia bleiv sett í verk fyri at hjálpa floksfelaganum hjá núverandi amerikanska forsetanum at vinna valið í novembur.

Hvítu Húsini vóru skjót at avsanna skuldsetingarnar hjá russiska forsætisráðharranum. Talsmaðurin hjá Hvítu Húsunum segði, at tað er Russland, sum hevur ábyrgdina av tí, sum er hent í Georgia.

Russland roydi í gjár at fáa londini í Miðasia at viðurkenna Suðurossetia og Abkhasia, men hini londini siga í einari felags fráboðan, at tey stúra fyri støðuni og mæla til semju og frið.

## STUTT SAGT

### Norskar gentur snúsa

Í Noregi vísir ein kanning, at talið á ungum gentum, sum brúka tubbak, er ikki broytt stórvegis tey seinastu fýra árini. Hinvegin vísir tað seg, at altsamt fleiri norskar gentur sleppa sigarettunum og fara at snúsa ístaðin fyri, skrivar Aftenposten.

Í veruleikanum er talan um eina sera stóra broyting. Í 2004 vóru tað 2,4 prosent av teimum ungu gentunum, sum snúsaðu, men í dag er tað talið trífaldað og er nú 7,3 prosent. Tølini vísa eisini, at tað eru eisini fleiri ungir dreingir, sum velja snúsið fram um sigarettina. Í 2004 snúsaðu 18,5 prosent av teimum norsku dreingjunum. Í dag eru tað 24,8 prosent, sum fáa sær upp í nevið, skrivar Aftenposten.

### Máttmikil kvinna

Sambært amerikanska tíðarritinum Forbes er týski kanslarin, Angela Merkel, heimsins máttmesta kvinna, og tað er triðju ferð, at hon fær hendan heiðurin. Aðrar kvinnur, sum hava týðandi politisk embæti, og sum eru á listanum saman við Angelu Merkel, eru amerikanski uttanríkisráðharrin, Condoleezza Rice, argentinski forsetin, Christina Fernandez, finski forsetin, Tarja Halonen, ukrainski forsætisráðharrin Yulia Tymoshenko, og Hillary Rodham Clinton, senatorur.

### Vilja ikki striptease

Í Reykjavík eru býráðslimirnir ikki serliga fegnir um, at fleiri av dansi- og matarstøðunum í býnum hava valt at fáa meiri ella minni naknar kvinnur at dansa fyri gestunum. Málið var fyri á fundi í býráðnum fyrradagin, og har samtykti eitt samt býráð at senda Altinginum eina áheitan um at gera neyðugar broytingar í verandi lóggávu, so tað verður bannað dansi- og matarstøðum at skipa fyri striptease.